

# HEIÐURSBRÆV

Við hesum heiðursbrævið verður váttað at

**Jens-Kjeld Jensen**

verður heiðraður av Vitanum við hesi grundgeving:

Tú hevur í áratíggju meiri enn nakar annar varpað ljós á føroyska lívmargfeldið. Savnað, skipað og greinað fjølbroytta lívið í okkara skroypiligu náttúru og skapt eina nýggja og betri fatan millum føroyingar, um týdningin av hesum dýrabara tilfeingi. Víst á hvussu avgerðandi varðveitslan av náttúruni - við øllum hennara ymsu brigdum - er fyri okkum sum tjóð. Tú hevur óvíkiliga upplýst, vegleitt og varskógvað føroyingar, uttan mun til, um niðurstøðurnar vóru væl lýddar ella ei.

Vitin er lagsfelagsskapur stovnsettur og samansettur av fólki, sum hava ásannað, at tað er tørvur á at heiðra úrmælingum, sum í verki, yvir tíð og við ósjálvsøkni, hava framt óvanlig og góð avrik føroysku tjóðini at gagni. Felagskapurin er óheftur av politiskum, átrúnaðarligum og fíggjarligum áhugamálum í síni meting av hvør verður heiðraður. Felagsskapurin er undir leiðslu av einari lagsnevnd, sum tekur allar avgerðir.

Við hesum heiðursbrævi fylgir heiðursmerki, sum er krossur til hæddar og breiddar 1,5" x 1,25" við oyggjunum í miðjuni og áskriftini "Pro aris et focis" í bogaðum teksti omanfyri, festur í lagsband í føroysku litunum til hæddar og breiddar 2" x 1,34".

Pro aris et focis

Vitin

